# óttan móti samgonguni



*Arbeiðsbyrðan hjá løgmanni hevur verið so mikið stór teir fyrstu fýra mánaðirnar, at hann enn ikki hevur havt stundir til nakran frídag. Her í samrøðu við Rás2 og Sosialin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

fingið hesar reaktiónir í arbeiðararørsluni. Er tað nakar, sum hevur brúkt tíð upp á at fáa málið loyst soleiðis, at bæði arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar kunnu liva við tí, so eru tað eg og Javnaðarflokkurin. Tí er hasin kritikkurin eitt sindur órímiligur. Tað er bláoygt at halda, at Javnaðarflokkurin skal renna ørindi fyri fakrørsluna einsamalla. Sum ábyrgdarflokkur og stjórnarberandi flokkur er tað greitt okkara skylda at taka atlit til tann samlaða búskapin. Vit hava óteljandi dømi um, at partar av vinnuni hava trot á arbeiðsmegi. Hetta trotið hevur verið í longri tíð, og tað harmar meg, at útlendingamálið varð so seint loyst, sum tað bleiv. Orsøkin til hetta er, at vit ikki vildu geva heilt leyst á hesum økinum. Vit fingu hetta markið við teimum 3,5 prosentunum inn í lógina, sum eg harmist um, at fakfelagsrørslan ikki sær tað positiva í.

*Men fakfelagsrørslan hevur sett nøkur krøv til, hvussu hetta skal skipast. Hví vilja tit ikki ganga teimum á møti?*

- Tað meini eg, vit hava gjørt, og eg kann endurtaka, hvat eg havi sagt: Trý ting vórðu framførd, og tey vóru, at útlendingar ikki skulu hava framíhjárætt. Hinvegin, tá vit taka útlendingar inn, so má teimum tryggjast arbeiði, hví skal man annars taka tey inn. Og framíhjárættin haldi eg, vit eisini eru komin langt við, tí Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur givið skrivliga tilsøgn um at fara undir samráðingar um eina fastlønarskipan fyri fiskavirkisarbeiði. Hetta kundi blivið ein av teimum heilt stóru sigrunum í fakfelagsrørsluni, um tað eydnaðist. Næsta kritikkpunkið var eftirlit, og har arbeiða vit við at gera eina útlendingastovu, sum millum annað skal taka sær av eftirlitinum. Triðja punktið var kunningin, og har er ein lóggáva samtykt, at útlendingarnir skulu verða kunnaðir um teirra rættindi og teirra skyldur á tí nýggja arbeiðsplássinum. So eg meini, at vit langan veg hava innfríað tey ynskini, sum fakrørslan hevur.

*Samstundis hevur tú eina útsøgn frá forkvinnuni í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, at hon ikki stuðlar Javnaðarflokkinum longur?*

- Nei, tað havi eg noterað mær, at hon hevur sagt. Men við tí tilsøgnini Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur givið og við tí brennandi ynski, ið eg gangi út frá, at Ingeborg Vinther hevur um eina fasta løn, so burdi tað verið ein fantastiskur møguleiki at fara í gongd nú og arbeiða fram ímóti eini fastlønarskipan. Og tað hevði sjálvandi frøtt meg, um vit kunnu virka til, at hetta gerst veruleiki. Hinvegin kann eg ikki diktera, hvat Ingeborg Vinther skal atkvøða politiskt. Tað verður hennara avgerð, men eg meini, at Javnaðarflokkurin hevur borið seg ótrúliga skilagott at í hesum málinum. Eisini í mun til, hvørji ynskir fakrørslan hevur sett fram. Eg eg sakni tí eina portión av rímuligheit í kritikkinum. Serliga tá vit hava fingið eitt hámark upp á 3,5 prosent inn í lógina, og tá hendan tilsøgnin um fastlønarskipan fyriliggur.

*Men tríggjar mánaðar eftir, at tú segði teg vilja snara Javnaðarflokkinum til vinstru í nýggju samgonguni, so kemur sjálv ímyndin av føroysku arbeiðararørsluni, Ingeborg Vinther, og sigur, at eg stuðli ikki flokkinum longur. Hevur tú ikki ein trupulleika?*

- Nei, eg havi avgjørt ikki nakran trupulleikan, tí óansæð hvat Ingeborg Vinther sigur, so meini eg, at politikkurin er snaraður til vinstru. Vit kunnu eisini hyggja at øðrum tingum, sum til dømis barsilsskipanini, har frambrot eru hend til frama fyri tey tímaløntu.